# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

## Spenningur til tað síðsta

**Hóast Sandavágur er væl framman fyri bæði Havnina og Klaksvík undan seinasta umfarinum í liðkappingini í talvi, kann roknast við, at styrktu liðini hjá avbjóðarunum kunnu gera tað sera spennandi**

TALV
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



*Sum vanligt, verður seinasta umfarið í øllum deildum telvað á einum og sama stað*

*Mynd: Talvsamband Føroya*

Talvfelagið í Sandavági hevur í morgun gyltan møguleika at fáa besta úrslitið í 41 ára gomlu søguni hjá felagnum, sum kann yvirtrumfa bronsuna frá 2008. Undan seinasta umfarinum í liðkappingini í 1. deild, er Sandavágur á odda við 23 stigum, men kapping fæst óivað frá Klaksvíkar Talvfelag 1, sum hevur 20½ stig og Havnar Telvingarfelag, sum hevur 20 stig.

Væntandi hava tó bæði Havnin og Klaksvík styrkt sær liðini til hetta seinasta umfarið. Støðan er tann, at fáa sandavágsmenn hálvtannað stig í sínum dysti ímóti Havnini, er tað nóg mikið til gullið og meistaraheitið, samstundis sum Havnin í sínum lagi skal fáa minst hálvtfjórða stig burtur úr dystinum, tí annars er meistaheitismøguleikin fokin hjá havnarmonnum.

Skulu klaksvíkingar fáa fatur á meistaraheitinum, krevst stórsigur ímóti føroyameistarunum úr Vestmanna, sum eru beint í hølunum á trimum teimum fremstu. Men vinnur Vestmanna hinvegin í minsta lagi 3-1 á Klaksvík 1, er bronsan í øllum førum tryggjað.

Skuldi Havnin vunnið 3½-½ á Sandavági og Klaksvík 3-1 á Vestmanna, verður umdystur beinanvegin millum Havnina og Sandavág, fyrst við kviktalvi og – um einki er avgjørt – síðani við snartalvi. Innanhýsis dystarstigini merkja, at Klaksvík ikki er við í møguligum umdysti.

### Hinar deildirnar

Longu undan seinasta umfarinum í 2. deild er greitt, at Tofta Talvfelag aftur verður at síggja í 1. deild, eftir at royndirnar eftir uppflytingini eru miseydnaðar tey bæði undanfarnu árini, tá tað bara rakk til silvur og bronsu.

Kappingin í 3. deild er eitt sindur øðrvísi, tí har er longu innleiðandi telvað um rættin til at kappast um ymsu plaseringarnar. Havnin og Vestmanna telva seinna finaludystin um gullið í morgin, meðan Gøta og Havnin 4 telva um bronsuna.

Hjá unglingunum stendur kappingin um føroyameistaraheitið millum Klaksvík og Havnina, meðan Sandavágur longu hevur vunnið bronsuna og kann ikki røkka silvurinum, samstundis sum greitt er, at Havnin í minsta lagi vinnur silvur.

Seinasta umfarið í liðkappingini í øllum fýra deildum verður telvað í fimleikarhøllini í Klaksvík, og byrjað verður fyrrapartin í morgin klokkan 11.30.

## Arnbjørn Danielsen gevst

**Arnbjørn Danielsen boðar nú frá, at hann ikki fer at spæla fótbólt í komandi kappingarári**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Arnbjørn Danielsen boðar umvegis heimasíðuna hjá B68 frá, at hann gevst við fótbóltinum. Hann hevur síðstu tíðina havt trupulleikar við rygginum, og hartil heldur hann tað vera ov tíðarkrevjandi at koyra ein tíma til venjing hvørja ferð.

Í fleiri ár hevur Arnbjørn, sum upprunaliga spældi í álopinum, spælt í verjuni hjá B68. Somuleiðis hevur hann verið stýrimaður á liðnum, samstundis sum hann hevur verið liðformaður.

Fyri nøkrum árum síðani spældi Arnbjørn Danielsen eisini eitt skifti við B36. Somuleiðis hevur hann royn seg á fótbóltslandsliðnum, og hann er skrásettur fyri átta altjóða landsdystir Føroyar.

## EB/Streymur og HB í ársins fyrsta dysti

**Einasta, sum kann sigast við vissu undan Stórsteypadystinum sunnudagin, er at tað verður ein nýggjur vinnari í ár**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



*Í Stórsteypadystinum millum EB/Streym og HB sunnudagin fær Lions-steypið nýggjan vinnara*

Fyrsti almenni fótbóltsdysturin á árinum millum lið í fremstu røð verður spældur á Ovara völli sunnudagin klokkan 15, tá greipuvinnararnir, EB/Streymur, spæla ímóti silvurvinnarunum í landskappingini, HB, í árliga Stórsteypadystinum um Lions-steypið.

Samstundis sum talan er um dyst millum tvey av feløgunum, ið óivað eisini fara at liggja framvið í ár, er hetta eisini ein dystur við vælgerandi endamáli, sum Fótbóltssambandið og Lions Club skipa fyri í felag. Og í ár fer ágóðin av dystinum til ungdómsdeildina á Føroya Barnaheimi.

Bæði EB/Streymur og HB hava fyrr royn seg í Stórsteypadysti, men hvørki teirra hevur enn nakrantíð vunnið Stórsteypið. EB/Streymur tapti í fjør fyri NSÍ, og HB tapti í fyrraárið fyri B36, eftir javnleik og síðani brotssparkskapping.

Sostatt er tað einasta, ið kann sigast við vissu undan dystinum, at talan verður um ein nýggjan vinnara, tá Lions-steypið skal handast eftir dystin.

## Gunnar skiftir til Wrexham

**Gunnar Nielsen, ið vardi føroyska málið ímóti Íslandi sunnudagin, skal spæla fyri walisiska felagið Wrexham FC restina av kappingarárinum**

FÓTBÓLTUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Gunnar Nielsen hevur fyri kortum skrivað undir hálvtriðja árs sáttmála við Manchester City, men er nú hann fyri restina av kappingarárinum leigaður út til Wrexham, sum spælir í fimtbestu ensku deildini, Football Conference, ið eisini nevnist Blue Square Premier.

Gunnar spældi sín fyrsta A-landsdyst sunnudagin, og hann stóð sum ein brandur, tá Føroyar sunnudagin vunnu 2-1 á Íslandi í Kórinn-høllini í Kópavogi.

Men tá Gunnar er sjálvur fjórði ella fimti í røðini av málverjum hjá Manchester City, fær hann ikki teir heilt nógvu dystirnar, og verður leigumálið tí mett sum ein góður møguleiki hjá honum at fáa dystarvenjing.

Gunnar Nielsen, sum hevur fingið fótbóltsuppvøksturin í HB, skifti í 2007 frá danska Frem til Blackburn Rovers í enska Premier League, og fyri kortum skifti hann haðani til Manchester City.



*Tað er fyri at geva Gunnari Nielsen dystarvenjing, at Manchester City hevur leigað hann út til walisiska felagið Wrexham FC*